FJØLRIT

- røkir føroysk listarættindi



# ÁRSFRÁGREIÐING · JAN 2018

**ÚTGEVARI:** Fjølrit
**MYNDIR:** Helle Thede Johansen
**SNIÐGIVIÐ & SETT UPP:** Helle Thede Johansen

Endurnýtsla av tilfari úr blaðnum er bert loyvd við skrivligum loyvi.

# Fjølrit

## - røkir føroysk listarættindi

Fjølrit er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt.

Brúk merkir øll endurgeving – ljósriting, avriting, fjølriting og onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg við framførsla, útgáva ella framleiðsla, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniði verkið er skapt ella er til taks.

### Limafeløg

Hesi feløg eru limir í Fjølrit og tað eru limir í hesum feløgum, Fjølrit umboðar.

- Rithøvundafelag Føroya
- Føroysk tónaskøld
- Føroysk myndlistafólk
- Føroyskir yrkisfotografar
- Føroysk bókaforløg
- Føroya miðlafólk

### Umboðsráðið

Hvørt limafelag tilnevnir eitt umboð og eitt varaumboð i umboðsráðið.

Umboðsráðið eigur fyrst og fremst:

- At gera av, hvussu Fjølrit skal virka og leggja virkisætlan.
- At hava eftirlit við stjórnini.
- At velja fólk í stjórnina og møguligar arbeiðsbólkar.

### Lóg um upphavsrætt

Fjølrit hevur loyvi frá Mentamálaráðnum at virka sum rættindafelagsskapur, í samsvari við § 40 stk. 1 í løgtingslóg um upphavsrætt.

### Stjórnin og daglig umsiting

Stjórnin er mannað soleiðis:

- Atli K. Petersen, formaður
- Jonhard Mikkelsen, skrivari
- Helle Thede Johansen, kassameistari

Sigmund Poulsen er knýttur at Fjølritum sum løgfrøðiligur ráðgevi.

Heidi Durhuus, KT-mennari, er per 1. apríl 2018 sett at taka seg av dagligu umsitingini.

Samband fæst við at senda teldupost til post@fjoelrit.fo ella ringja til 23 86 00.

# Formansfrágreiðing
## til aðalfundurin hjá Fjølrit
## 16. Januar 2018

### Grundarlag
Fyrst ein heilt stutt gjøgnumgongd av søguni viðvíkjandi Fjølrit:

Ljósritagrunnurin byrjaði at virka í 1986 við 3 ára royndartíð. Í 1989 var gjørt av at halda fram í enn eitt triára skeið.

Fjølrit verður stovnað í 1992, og Fjølritagrunnurin kemur í 1994.

Í tíðarskeiðnum frá 1. apríl 1984 og fram til 31. des. 2013 hava rættindafeløgini avtalu um viðurlag gjøgnum ein verndarsáttmála við Føroya Landsstýri.

### Føroyskt málsøki
Upphavsrættur verður yvirtikin sum málsøki 2010.

Í 2011 sigur MMR sáttmálan upp frá 1992 við Fjølrit pr. 31/12 2011, men noyðist 12/6 2012 at boða frá, at av tí at eingin løgtingslóg er samtykt enn, má gamli sáttmálin galda til nýggj skipan er sett í verk.

Nýggj løgtingslóg verður so samtykt 6. mai 2013, og gamli sáttmálin enn einaferð uppsagdur, hesa ferð frá 31/12 2013.

### Góðkenning
10. okt. 2014 fær Fjølrit aftur góðkenning sum felagsskapur til at umsita rættindini hjá limum felagsins og øðrum, sum virka innan somu øki, samb. § 40 stk 1 (í upphavrættarlógini). Loyvið er galdandi fram til 19. mars 2019.

Av tí at løtingslógin frá 2013 var ein rammulóg, har kunngerðir skuldu orðast og lýsast, áðrenn



hon kundu takast í nýtslu, var tó framvegis ikki møguligt at fara til verka. Ikki fyrr enn 30. apríl 2015 verður núverandi lóg um upphavsrætt lýst.

## Fyrsti aðalfundur í fleiri ár

11. juli 2017 er eykaaðalfundur í Fjølrit. Hetta er fyrsti aðalfundur í Fjølrit í fleiri ár.

Á fundinum verða vald Helle Thede Johansen, Jonhard Mikkelsen og Atli K. Petersen í nevndina umframt, at Ole Wich verður formaður í umboðsráðnum.

## Arbeiðssetningur

Á fundi 17. juli leggur umboðsráðsformaðurin (Ole Wich) fyri starvsnevndina eitt kommissorium, sum greitt skal lýsa arbeiðssetningin hjá starvsnevndini sæð við eygunum hjá umboðsráðnum:

Í fyrsta lagi:

- Fáa undirskrivað avtalu við MMR um avritspening
- Fáa yvirlit yvir og fáa inn pening, fallin er til gjaldingar, fyri avrit
- Fáa yvirlit yvir avtalur, ið enn vanta, millum annað við kommunur
- Fáa greiðu á fíggjarstøðuni
- Meta um inntøkur og útreiðslur eitt ár fram í tíðina

Í øðrum lagi:

- Fara undir arbeiðið at fáa øll sáttmálaviðurskifti á øllum rættindastigum lógfest og dagførd og fáa lóglig sáttmálasambond við einstakar rættindahavar ígjøgnum limafeløgini.
- Meta um fíggjarstøðu við at greiða frá væntaðum inntøkum og umsitingarútreiðslum við:
    1. B-avtalum, sum nú eru í gildi
    2. Avtalu við CopyDan
- Kunna limir um avgerðir á aðalfundi 11. juli 2017
- Saman við formanni fyri umboðsráðið dagfesta næsta aðalfund

Arbeiðssetningurin er síðan samtyktur av øllum limafeløgunum í Fjølrit.

## Avtalu við MMR

Endalig avtala millum MMR og Fjølrit verður undirskrivað tann 4. aug. 2017. Avtalan umfatar miðnáms og hægri útbúgvingarnar, sum MMR varðar av, umframt umsitingina.

## Kommunurnar

30. august verður uppskot um avtalu sent til Kommunusamskipan Føroya (KSF). Hetta uppskot er tillagað útgáva av avtaluni við MMR við tí atliti at umfata alla kopiering sum fer fram í kommunalum regi, ein sokallað "all inclusive" avtala.

Nakrar royndir hava verið at koma víðari í málinum. KSF hevur biðið um neyvari útgreining av, hvussu vit eru komin fram til leistin, sum vit byggja avtaluna á.

Sigmund Poulsen advokatur hevur vegna Fjølrit verið í sambandi við advokatin hjá KSF hesum viðvíkjandi. Síðani er einki hent frá teirra síðu.

Okkara seinastu fyrispurningar til KSF beint fyri jól vórðu ikki svaraðir. Í seinasta skrivinum til KSF boðaði Sigmund frá, at um vit ikki hoyrdi aftur frá teimum fyri ársskiftið, tóku vit tað sum tekin um, at tað var í lagi at senda uppskot um avtalu út till hvønn einstakan lim í KSF.

Nýggja árið byrjaði uttan nakað aftursvar frá KSF. Vit avgjørdu tí at senda eitt tíðindaskriv út fyri at gera vart við óhaldbaru støðuna og varpa ljós á óheimilaðu kopieringina. Líkt er til, at hetta hevur havt ávísa ávirkan.



Sigmund Poulsen sendi 8. januar 2018 øllum kommununum avtalurnar til undirskrivingar, og næsta stigið verður at seta sjøtul á hesa tilgongd. Tá ið komið er undir land, og allar kommurnar hava skrivað undir, hevur Fjølrit endiliga fingið fótafesti og kann tá veruliga fara at virka.

## Kunning út

Fjølrit hevur sum felagsskapur, umframt at umsita inntøkurnar av kopiering vegna limir sínar og teirra, ið virka innan somu øki, eisini til uppgávu at kunna brúkararnar um, hvat ið er loyvt, og hvat fer út um mark.

Eisini kann við tíðini verða talan um at víðka virkisøkið hjá Fjølrit, so onnur listarfólk og rættindahavar gerast limir. Hetta fer tíðin at vísa.
Helle hevur sett á stovn heimasíðu vegna Fjølrit og hevur riggað til facebook profil, soleiðis at Fjølrit kann gerast sjónligari.

## Setan av umsitara

Samtykt er, um heimild fæst frá aðalfundinum, at søkja eftir starvsfólki sum skal standa fyri dagligu umsitingini av Fjølrit umframt at hava samband við kundar okkara og limirnar í Fjølrit.

## Altjóða samstarv

Fyri at fáa innlit í tað, ið fyriferst á økinum í londum uttan um okkum, hevur starvsnevndin í Fjølrit og umboðsráðsformaðurin verið á ráðstevnum í tveimum førum seinastu mánaðirnar.

Seinast í august vóru Atli K. Petersen og Jonhard Mikkelsen í Oslo til "Nordisk stormøte". Og um hálvan november vóru Helle Thede Johansen og Ole Wich í Keypmannahavn á "Nordic Copyright Seminar".

Einki er at taka seg aftur í, at vit eru vorðin munandi vísari av hesum báðum ferðunum.



Greitt er eisini at vit fara eisini frameftir at vera við á slíkum tiltøkum.

Nevnast kann í hesum sambandi eisini, at Fjølrit í fleiri ár hevur verið limur í IFRRO (International Federation of Reproduction Rights Organisations).

At enda má eitt hjartasuff sleppa millum rivini. Tað varð ein sovorðin lætti, at avtalan við MMR gjørdist veruleiki seinasta summar. Men ilt er at gloyma naggatódnina og ørkymlanina, sum valdaðu fram til tá.

Brúkararnir av verkunum, sum limir okkara eiga, hava víst eina ótrúliga líkasælu, tá ið ræður um at kanna, um loyvini eru lóglig, áðrenn kopiering er farin fram.

Í summun førum er sjálvandi talan um óvitan, men MMR sjálvt við sínum professionella skara av útbúnum embætisfólkum hevur ikki víst í verki nakað hastverk at fáa hesi viðurskifti í rætt lag. Heldur tykist, at tað er roynt at forhála og kanska enntá at leggja fótonglar fyri royndirnar hjá Fjølrit at koma á mál.

Tað hevur alla tíðina verið trupulleikin hjá brúkaranum at kopierað varð í heimildarloysi. Okkara limir hava einki skeivt gjørt.

Ein stuttlig detalja, sum kanska lýsir málið væl, er, at í ótolni og frustratión yvir at einki hendi, samtykti Fjølrit á eykafundi 25. juli 2012 at átaka sær at gera uppskot til kunngerð fyri MMR.

Vestmanna, 16. januar 2018

Atli K. Petersen
Formaður í starvsnevndini



# FJØLRIT

**Lützenstrøð, 4, 100 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 1. mai - 31. desember 2017

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann 16. januar 2018.

Atli K. Petersen
Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit

| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 5 |
| **Ársroknskapur 1. mai - 31. desember 2017** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 11 |

## Leiðsluátekning

Stjórnin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. mai - 31. desember 2017 hjá FJØLRIT.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við góðan almennan roknskaparsið.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2017 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. mai - 31. desember 2017.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 15. januar 2018

**Stjórn**

| | | |
|---|---|---|
| Atli K. Petersen<br>Formaður | Jonhard Mikkelsen<br>Næstformaður | Helle Thede Johansen<br>Kassameistari |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til leiðsluna í FJØLRIT**

**Átekning á ársroknskapin**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá FJØLRIT fyri roknskaparárið 1. mai - 31. desember 2017 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir góðum roknskaparsiði.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við góðan roknskaparsið. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2017 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. mai - 31. desember 2017 samsvarandi ársroknskaparlóggávuni.

**Ískoytisupplýsingar viðvíkjandi viðurskiftum í roknskapinum**

Uttan at hetta ávirkar okkara niðurstøðu skulu vit vísa á leiðslunnar umrøðu í notu 2 á síðu 11, har greitt verður frá, at ein týðandi roknskaparlig óvissa knýtir seg at virðisásetingini á skuldarum pr. tann 31. desember 2017.

Felagið hevur við virknað frá inniverandi roknskaparári valt at grannskoðað ársroknskapin. Seinasta ár hevði felagið ikki valt nakran aðalfundarvaldan grannskoðara. Samanberingartølini eru sostatt ikki grannskoðað.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Sum ásett í ársroknskaparlóggávuni hava vit lisið leiðslufrágreiðingina. Annað er ikki gjørt hesum viðvíkjandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Við støði í hesum er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 15. januar 2018

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Heini Thomsen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | FJØLRIT<br>Lützenstrøð<br>4<br>100 Tórshavn | |
| | Heimasíða: | www.fjoelrit.fo |
| | V-tal: | 429198 |
| | Roknskaparár: | 1. mai - 31. desember |
| **Stjórn** | Atli K. Petersen, Formaður<br>Jonhard Mikkelsen, Næstformaður<br>Helle Thede Johansen, Kassameistari | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**

Virksemið hjá Fjølriti er at útvega upplýsingar og mæla til tiltøk til frama fyri áhugamálini hjá rættindaeigarunum. At samskipa krøvini hjá limafeløgunum, samráðast og gera sáttmálar teirra vegna. At umsita og býta samsýningar og endurgjøld fyri at brúka upphavsrættarliga vard verk. At veita feløgum hjá útlendskum rættindaeigarum og móttaka frá teimum samsýningar og endurgjøld.

FJØLRIT er góðkendur felagsskapur sambært § 40, stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 fra 30. apríl 2015 um upphavsrætt (hereftir nevnd upphavsrættarlógin) og umboðar rættindahavarar í sambandi við øll sløg av endurgeving, ljósriting, avriting, fjølriting ella onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg í framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniði verkið er/verður skapt ella er til taks.

Í løtuni eru hesi feløgini limir í FJØLRIT: Rithøvundafelag Føroya, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Miðlafólk og Føroysk Myndlistafólk. Í avtaluhøpi umboðar Fjølrit allar rættindahavarar innan hesi øki.

FJØLRIT hevur sum felagsskapur sum so einki fíggjarligt endamál.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri FJØLRIT er gjørd í samsvari við góðan almennan roknskaparsið fyri feløg í flokki B.

Ársfrásøgnin verður gjørd í donskum krónum.

FJØLRIT hevur í árinum valt at umleggja roknskaparárið frá 1. mai til 30. apríl til kalenderaárið 1. januar til 31. desember. Samanlíkningartøluni eru fyri týðarskeiðið 1. mai 2016 til 30. apríl 2017.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapurin

### Nettosøla

Bruttoúrslit umfatar nettosølu, aðrar rakstrarinntøkur og annan uttanhýsis kostnað.

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir, tap av áognarum og operationellar leasingkostnaðir.

### Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata samsýningar, fundarpening og ferðaútreiðslur.

## Nýttur roknskaparháttur

### Fíggjarstøðan

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum.

**Skuld**

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur

| Nota | | 1/5 - 31/12 2017 kr. | 1/5 - 30/4 2016 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Bruttoúrslit** | **1.394.090** | **-51** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -64.879 | -23 |
| | **Rakstrarúrslit** | **1.329.211** | **-74** |
| | Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **1.329.211** | **-74** |

## Fíggjarstøða

**OGN**

| Nota | | 31/12 2017 kr. | 30/4 2017 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| 2 | Vøru- og tænastuáogn | 1.500.000 | 0 |
| | Onnur áogn | 154.590 | 155 |
| | Áogn tilsamans | 1.654.590 | 155 |
| | Tøkur peningur | 229.064 | 386 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **1.883.654** | **541** |
| | **OGN TILSAMANS** | **1.883.654** | **541** |

## Fíggjarstøða

**SKYLDUR**

| Nota | | 31/12 2017 kr. | 30/4 2017 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 3 | Flutt úrslit | 1.869.109 | 540 |
| | **Eginogn tilsamans** | **1.869.109** | **540** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 7.500 | 0 |
| | Onnur skuld | 7.045 | 1 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 14.545 | 1 |
| | **Skuld tilsamans** | **14.545** | **1** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.883.654** | **541** |

## Notur

| | | 1/5 - 31/12 2017 kr. | 1/5 - 30/4 2016 t.kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | |
| | Samsýning, fundarpeningur og ferðaútreiðslur | 64.581 | 23 |
| | Barsilsgjald | 298 | 0 |
| | | **64.879** | **23** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **2.** | **Vøru- og tænastuáogn** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 1.500.000 | 0 |
| | | **1.500.000** | **0** |

FJØLRIT hava tann 29.12.2017 sent Mentamálaráðnum eina rokning á kr. 1.500.000 fyri royalties í sambandi við fjølritan av tilfari í skúlum og stovnum í tíðarskeiðinum 1. januar 2014 til 4. august 2017. Upphæddin er uppgjørd sambært uppgerðum frá undanfarnum árum. Mentamálaráðið hevur tó ikki boðað frá um uppgerðin verður góðtikin í verandi líki, og ein týðandi roknskaparlig óvissa knýtir seg at virðisásetingini á skuldarum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| **3.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 539.898 | 614 |
| | Flutt úrslit í árinum | 1.329.211 | -74 |
| | | **1.869.109** | **540** |

# Fjølrit

| Ársroknskapir | 2005/06 | 2006/07 | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | | | |
| Gjald samb. Sáttmála | 200.000 | 133.328 | | 283.000 | 216.667 | 100.000 | 200.000 | 200.000 |
| Meirnýtslu i skúlunum | 249.000 | 354.254 | | 274.000 | | 534.227 | 313.349 | 336.572 |
| Rentuinntøkur | 22.000 | 23.723 | | 39.000 | 44.156 | 23.758 | 44.682 | 2.059 |
| Inntøkur tilsamans | 471.000 | 511.305 | - | 596.000 | 260.823 | 657.985 | 558.031 | 538.631 |
| **Útreiðslur** | | | | | | | | |
| Útgoldin stuðul | 338.000 | 428.000 | | 469.000 | 581.900 | 714.000 | 730.333 | 563.000 |
| Grannskoðan | 6.000 | 6.125 | | 10.000 | 9.125 | 10.545 | 13.304 | 13.594 |
| Starvsfólkakostnaður | 6.000 | 6.376 | | | | | | 43.561 |
| Skrivstovuútreiðslur | 43.000 | 84.284 | | 50.000 | 43.649 | 65.579 | 52.703 | 108.111 |
| Serfrøðingahjálp | 248.000 | | | | | | | |
| Limagjald | | | | | 6.162 | | | |
| Leiguútreiðslur | | | | | | | | |
| Vantandi skjøl | | | | | | | | |
| Útreiðslur tilsamans | 641.000 | 524.785 | - | 529.000 | 640.836 | 790.124 | 796.340 | 728.266 |
| Rakstrarúrslit | -170.000 | -13.480 | - | 67.000 | -380.013 | -132.139 | -238.309 | -189.635 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | | | | |
| **Ogn** | | | | | | | | |
| Postgiro | 113.000 | 218.668 | | 2.000 | 2.305 | 9.106 | 13.333 | 21.545 |
| Eik Banki | 150.000 | 30.129 | | 313.000 | 115.951 | 83.536 | 112.260 | 164.414 |
| Eik Banki | 5.000 | 5.406 | | | | | | |
| Tilgóðar | | | | 509 | | | | |
| Lánsbrøv | 800.000 | 800.000 | | 800.000 | 617.240 | 522.280 | 250.000 | |
| Ogn tilsamans | 1.068.000 | 1.054.203 | - | 1.115.509 | 735.496 | 614.922 | 375.593 | 185.959 |
| **Skuld** | | | | | | | | |
| Eginogn frá seinasta árið | 1.238.000 | 1.068.000 | 1.054.520 | 1.048.509 | 1.115.509 | 735.496 | 603.357 | 365.048 |
| Ársúrslit | -170.000 | -13.480 | - | 67.000 | -380.013 | -132.139 | -238.309 | -189.635 |
| Eginogn | 1.068.000 | 1.054.520 | 1.048.509 | 1.115.509 | 735.496 | 603.357 | 365.048 | 175.413 |
| Onnur skuld | 395.000 | | | - | - | 11.565 | 10.545 | 10.545 |
| Skuld tilsamans | 1.068.000 | 1.054.520 | 1.048.509 | 1.115.509 | 735.496 | 614.922 | 375.593 | 185.958 |

# Fjølrit

| Ársroknskapir | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/17 | 2017<br>1. mai-31.des. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | |
| Gjald samb. Sáttmála | 200.000 | | | | 1.500.000 |
| Meirnýtslu i skúlunum | | 773.985 | | | |
| Rentuinntøkur | 171 | 273 | 101 | | |
| Inntøkur tilsamans | 200.171 | 774.258 | 101 | - | 1.500.000 |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Útgoldin stuðul | 315.000 | 98.000 | 15.500 | | |
| Grannskoðan | 14.458 | | | | 7.500 |
| Starvsfólkakostnaður | 25.000 | 25.000 | | 23.088 | 99.483 |
| Skrivstovuútreiðslur | 1.674 | 2.773 | 1.150 | 700 | 2.505 |
| Serfrøðingahjálp | | | | 30.000 | 55.000 |
| Limagjald | 6.031 | 6.313 | 6.317 | 6.298 | 6.301 |
| Leiguútreiðslur | | 15.960 | 13.680 | 13.650 | |
| Vantandi skjøl | | | | | |
| Útreiðslur tilsamans | 362.162 | 148.045 | 36.647 | 73.736 | 170.789 |
| Rakstrarúrslit | -161.992 | 626.213 | -36.546 | -73.736 | 1.329.211 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| **Ogn** | | | | | |
| Postgiro | 21.598 | 21.643 | 21.643 | 21.643 | 21.643 |
| Eik Banki | 2.369 | 473.946 | 451.081 | 363.665 | 207.421 |
| Eik Banki | | | | | |
| Tilgóðar | | 154.590 | 154.590 | 154.590 | 1.654.590 |
| Lánsbrøv | | | | | |
| Ogn tilsamans | 23.967 | 650.180 | 627.314 | 539.898 | 1.883.654 |
| **Skuld** | | | | | |
| Eginogn frá seinasta árið | 185.958 | 23.966 | 650.180 | 613.634 | 539.898 |
| Ársúrslit | -161.992 | 626.213 | -36.546 | -73.736 | 1.329.211 |
| Eginogn | 23.966 | 650.180 | 613.634 | 539.898 | 1.869.109 |
| Onnur skuld | | | 13.680 | 0 | 14.545 |
| Skuld tilsamans | 23.966 | 650.180 | 627.314 | 539.898 | 1.883.654 |

**FJØLRIT** · Postboks 62 · FO-110 · Tórshavn
www.fjoelrit.fo · Tel 23 86 00 · post@fjoelrit.fo